LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 19. september 2022
J.Nr.: LUM-16- 22/08550-19
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um vantandi svar frá Runavíkar kommunu í sambandi við umsókn um byggiloyvi til neyst og kanning av málsviðgerðini av umsóknum um byggiloyvi til neyst

Við skrivi, dagfest 3. mai 2022, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "
>
> ...
>
> Eg klagi yvir, at eg ikki havi fingið svar frá Runavíkar kommunu, bygginevndini, um umsókn sum eg sendi tann 6. mars 2021, um at byggja eitt neyst á matr. B, har grannin hevur fingið loyvi at bygt."

**Málsgongd**

Runavíkar kommuna viðgjørdi í byrjanini av 2020 eina umsókn um byggiloyvi til at byggja og innrætta eina hædd omaná neystagrund til frítíðarbústað. Sambært Runavíkar kommunu hava samtyktirnar í hesum máli týdning fyri viðgerðina av umsóknini hjá klagaranum. Tí verður greitt nærri frá viðgerðini av hesum málinum.

Omanfyri nevnda umsókn um loyvi at byggja og innrætta eina hædd omaná neystagrund til frítíðarbústað var viðgjørd á fundum í Byggi- og býarskipanarnevndini, tann 20. januar 2020, og í Vinnu- og havnarnevndini, tann 22. januar 2020. Á báðum fundunum varð samtykt, at mæla frá at geva byggiloyvi eftir verandi tekningum, grundað á hædd av bygging og at farið var út um matrikul.

Umsøkjarin broytti umsóknina, og tekniska deild í Runavíkar kommunu mælti, tann 14. februar 2020, til at viðgera umsóknina, meðan Vinnu- og havnarnevndin, tann 19. februar 2020, samtykti at útseta málið. Tekniska nevnd tók sama dag undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnarnevndini og vildi hava endurskoðað byggisamtyktina viðvíkjandi bygging á neystagrund. Byggi- og býarskipanarnevndin tók eisini sama dag undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd um, at endurskoða reglur fyri bygging á neystagrund.

Tann 12. mars 2020 mælti Tekniska deild til, at umsóknin frá borgaranum skuldi gangast á møti við ávísum treytum. Byggi- og býarskipanarnevndin gjørdi tó á fundi, tann 16. mars 2020, hesa samtykt:

> “Byggi- og býarskipanarnevndin samtykt, at málið verður liggjandi í nevndini og formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini og formaðurin í Vinnu- og havnarnevndini, saman við umsitingini, endurskoðar ásetingarnar um frítíðarbústað omaná neystum.”

Klagarin sendi, tann 6. mars 2021, soljóðandi umsókn um byggiloyvi til Runavíkar kommunu:

> “Umsókn um byggiloyvi
> Hey tit, eg vil við hesum søkja um byggiloyvi til neyst í B.
>
> Og eg sendi her tekningar av bygginigini.
> Vónandi er tilfarið nøktandi.
>
> Um spurningar eru, kunnu tit ringja til mín.
>
> Við ynski um skjóta og góða viðger.”

Tann 11. mars 2021 sendi Runavíkar kommuna klagaranum hesa móttøkuváttan:

> “Sagt verður frá, at vit hava móttikið umsókn tygara.
> Málið er skrásett og koyrt víðari til avgreiðslu á Teknisku deild.”

Klagarin hoyrdi ikki aftur frá Runavíkar kommunu og klagaði tí til umboðsmannin tann 3. mai 2022.

**Partshoyring**
Við skrivi, dagfest 4. mai 2022, varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Runavíkar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 27. mai 2022 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “
> ...
>
> Byggi- og býarskipanarnevndin og Vinnu- og havnarnevndin hava samtykt á fundi í mars 2020 at endurskoða reglurnar fyri neystabygging.
>
> Hetta arbeiði er ikki komið á mál enn og tí verða umsóknir um neystabygging parkeraðar, inntil uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini er liðugt viðgjørt og samtykt av býráðnum.
>
> Tíverri hevur A ikki fingið kunning um hetta.”

Tann 30. mai 2022 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Sigast skal frá, at har eru fýra neyst saman (líka), og eg havi goldið mín part av síðuni, sum ... hevur fingið loyvi at byggja og sum stendur ferdigt."

Við skrivi, dagfest 31. mai 2022, minti umboðsmaðurin Runavíkar kommunu á at senda umbidnu skjølini og skjalayvirlitið. Umboðsmaðurin bað eisini um at fáa sent nevndu samtyktir frá mars 2020 um at endurskoða reglurnar fyri neystabygging.

Tann 13. juni 2022 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum umbidnu skjølini.

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 14. juni 2022, bað umboðsmaðurin Runavíkar kommunu um at greiða nærri frá málinum og nágreina ávís viðurskifti.

Tann 17. juni 2022 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Vísandi til skriv tykkara, dagfest 14. juni 2022, í sambandi við klagu frá A havi eg svarað spurningum tykkara undir hvørjum spurningi sær:
>
> Hví var eingin kunning givin A um viðtøkuna, og at hansara mál varð lagt í bíðistøðu, tá hann lat umsókn um byggiloyvi inn í mars 2021?
> *Svar:* Tað er ein feilur, at A ikki er kunnaður um, at umsóknin bíðar eftir at byggisamtyktin í samband við neyst verður endurskoðað.
>
> Hvør viðgerð hevur verið av umsóknini hjá A?
> *Svar:* Eingin viðgerð hevur verið av umsóknini hjá A.
>
> Liggja aðrar umsóknir um bygging á neystagrund í bíðistøðu?
> *Svar:* 13 aðrar umsóknir um neystabygging eru í bíðistøðu.
>
> Hvørji byggiloyvi eru givin í sama øki til bygging av frítíðarbústaði oman á neyst síðstu 5 árini?
> *Svar:* Í økinum, sum A søkir um byggiloyvi til, er bara eittans byggiloyvi givið, sum er til .... ... hevur tó ikki søkt um loyvi til frítíðarbústað, men søkti bara um byggiloyvi til neyst...."

Í framhaldi av hesum svarinum sendi umboðsmaðurin, tann 21. juni 2022, Runavíkar kommunu soljóðandi spurningar:

> "
> ...
>
> Í brævi mínum tann 14. juni 2022 spurdi eg, um tað lógu aðrar umsóknir um bygging á neystagrund í bíðistøðu, og um so var, hvussu nógvar, nær umsóknirnar vóru latnar inn, um umsøkjararnir høvdu fingið boð um bíðistøðuna og orsøkina til hana?
>
> Við tað at Runavíkar kommuna ikki hevur svarað omanfyri nevndu spurningum, vil eg biðja kommununa beinanvegin senda mær svar, nær tær 13 umsóknirnar vóru latnar inn, um umsøkjararnir hava fingið boð um bíðistøðuna og orsøkina til hana?
>
> Harumframt ynski eg at fáa upplýst, hvussu leingi málini hava ligið í bíðistøðu.

> Eg fari eisini at biðja um avrit av tí kunning, sum teir 13 umsøkjararnir hava fingið um bíðistøðuna."

Tann 27. juni 2022 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum eitt yvirlit yvir mál um bygging á neystagrund í bíðistøðu og soljóðandi viðmerkingar:

> "
>
> ...
>
> Vísandi til teldupost tykkara 21. juni 2022, eru málini innkomin sum víst niðanfyri á yvirlitinum.
>
> Orsøkin til at málini ikki eru viðgjørd er, at Byggi- og býarskipanarnevndin og Vinnu- og havnarnevndin ikki eru komin til nakra niðurstøðu í sambandi við at endurskoða reglurnar fyri neystabygging, at leggja fyri býráðið.
>
> ...
>
> Viðheft avrit av skrivi til umsøkjara, sum er kunnaður um, at ásetingarnar fyri neyst verða endurskoðaðar í byggisamtyktini og dømi um skriv til umsøkjara, sum hevur fingið móttøkuváttan uppá umsóknina."

Sambært yvirlitinum frá Runavíkar Kommunu vóru 13 mál tilsamans íroknað málið hjá klagaranum. Millum tey 13 málini skilti eitt teirra seg burturúr, við tað at noktandi svar var givið umsøkjaranum tann 10. september 2020.

Runavíkar kommuna upplýsti í telduposti, dagfestur tann 28. juni 2022, at móttøkuváttanirnar til umsøkjararnar vóru soljóðandi:

> " Sagt verður frá, at vit hava móttikið umsókn tygara.
> Málið er skrásett og koyrt víðari til avgreiðslu á Teknisku nevnd."

Tann 28. juni 2022 upplýsti Runavíkar kommuna, at eingin av umsøkjarunum, hvørs umsókn var sett í bíðistøðu, hevði fingið kunning um bíðistøðuna og orsøkina til hana.

Runavíkar kommuna upplýsti, at kommunan í sambandi við bíðistøðuna ikki hevði nýtt mannagongdina í býarskipanarlógini § 8, har møguleiki er at biðja landsstýri um at nokta fyri nýtslu, ið verður hildin at vera ósamsvarandi ætlaðari broyting í byggisamtykt.

**Málini sum lógu í bíðistøðu**
Tann 29. juni 2022 bað umboðsmaðurin um at fáa avrit av øllum skjølum umframt skjalayvirlit í teimum málunum um umsókn um byggiloyvi til neyst, sum lógu í bíðistøðu.

Runavíkar kommuna sendi, tann 30. juni 2022, umbidnu málini og skjalayvirlit. Sambært yvirlitinum vóru 13 mál í bíðistøðu íroknað málið hjá klagaranum.

Niðanfyri er ein stutt gjøgnumgongd av málunum.

<u>Mál 1</u>
Umsókn um byggiloyvi var upprunaliga latin inn 14. juni 2021, og noktandi svar latið umsøkjaranum 10. september 2021, vísandi til at ásetingarnar fyri neyst í byggisamtyktini skuldu endurskoðast. Umsøkjarin lat umsókn inn av nýggjum tann 13. januar 2021 og fekk móttøkuváttan. Av skjølunum sæst, at umsøkjarin, tann 23. februar 2021, sendi umbøn um uppafturtøku til Runavíkar kommunu. Í umbønini vísti umsøkjarin á, at tað ikki gav meining, at noktandi svar var grundað við tilmæli frá Teknisku deild, tí umsøkjarin hevði fingið vegleiðing frá Teknisku deild í at skriva umsókn samsvarandi byggisamtyktini fyri økið. Umsøkjarin gjørdi eisini galdandi, at tað var ósakligt at grundgeva noktandi svarið við at arbeitt varð við broytingum, tí at galdandi byggisamtykt átti at verða nýtt at viðgera umsóknina.

Umsøkjarin sendi aftur, tann 6. apríl 2021, áminning um málið til Runavíkar kommunu.

Tann 6. apríl 2021 sendi Runavíkar kommuna móttøkuváttan og boðaði frá, at telduposturin var víðarisendur til málsviðgerðan á málinum, sum tíverri ikki var har tann dagin, men væntandi var aftur dagin eftir.

Sambært skjalayvirlitinum er ikki meira hent við hesum málinum.

<u>Mál 2</u>
Hetta er málið, har viðtøkan var gjørd um at seta mál um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu. Umsøkjarin fekk sambært skjølunum móttøkuváttan sama dag, sum hann sendi tillagaða umsókn inn tann 13. februar 2020. Næsta skjalið sambært skjalayvirlitinum er ein áminning, sum umsøkjarin sendi til Runavíkar kommunu tann 17. november 2020. Umsøkjarin ynskti at fáa at vita, um umsókn hansara var viðgjørd, og nær hann kundi vænta svar. Eisini bað umsøkjarin um innlit í málið. Eftir tað sæst einki vera hent sambært skjalayvirlitinum.

<u>Mál 3</u>
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 10. februar 2022, um byggiloyvi til neyst. Tann 14. februar 2022 sendi kommunan móttøkuváttan og síðani er, sambært skjalayvirlitinum, einki hent við málinum.

<u>Mál 4</u>
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 7. oktober 2021, um byggiloyvi til trappu til eitt neyst. Runavíkar kommuna sendi, tann 8. oktober 2021, móttøkuváttan og síðani er, sambært skjalayvirlitinum, einki hent í málinum.

<u>Mál 5</u>
Hetta er málið hjá klagaranum. Sambært skjalayvirlitinum er klagumálið við undirliggjandi skjølum skrásett undir málinum um umsókn um byggiloyvi.

<u>Mál 6</u>
Í hesum málinum søkti umsøkjarin um byggiloyvi til umvæling/umbygging av neysti tann 26. juni 2021. Tann 28. juni 2021 fekk umsøkjarin móttøkuváttan. Umsøkjarin sendi eina áminning til Runavíkar kommunu tann 14. desember 2021. Sambært skjalayvirlitinum er einki svar sent umsøkjaranum.

Mál 7
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 11. juni 2021, um byggiloyvi til tvey neyst, sum skuldu innrættast til frítíðarbústað. Umsóknin varð síðani tillagað til eitt neyst og send umaftur tann 28. februar 2022. Móttøkuváttan var sambært skjalayvirlitinum einans send tann 11. juni 2021.

Mál 8
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 18. november 2021, um byggiloyvi og keyp av lendi um møguligt. Sama dag fekk umsøkjarin móttøkuváttan. Tann 17. marts 2022 sendi umsøkjarin Runavíkar kommunu eina áminning. Sambært skjalayvirlitinum er einki hent við málinum síðani.

Mál 9
Í hesum málinum var send umsókn um byggiloyvi til neyst tann 9. august 2021. Sambært skjalayvirlitinum er einki annað hent við málinum.

Mál 10
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 22. august 2021, um byggiloyvi til at umvæla og gera av nýggjum omaná neystagrundir. Runavíkar kommuna sendi, tann 23. august 2021, eina móttøkuváttan og síðani er, sambært skjalayvirlitinum, einki hent í málinum.

Mál 11
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 3. mars 2021, um loyvi at broyta eitt neyst og bað um skrivliga tilsøgn um tað. Sambært skjalayvirlitinum er ikki annað hent við málinum.

Mál 12
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 6. juli 2020, um byggiloyvi til neyst umframt at keypa eitt økið frá kommununi afturat stykkinum hjá sær at byggja neystið á. Runavíkar kommuna sendi, tann 10. september 2020, noktandi svar til umsøkjaran vísandi til, at ásetingarnar um neyst í byggisamtyktini vóru undir endurskoðan. Sambært Runavíkar kommunu er hendan umsóknin í bíðistøðu enn hóast noktandi svar.

Mál 13
Í hesum málinum søkti umsøkjarin, tann 26. september 2021, um loyvi at byggja neyst sítt longur oman í fjøruna. Runavíkar kommuna sendi móttøkuváttan tann 27. september 2021 og síðani er, sambært skjalayvirlitinum, einki hent í málinum.

**Framhald av partshoyring**
Tann 4. juli 2022 sendi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu soljóðandi fyrispurningar, sum framhald av kanningini av málunum um byggiloyvi sum lógu í bíðistøðu:

> “Viðvíkjandi klagu frá A og kanningini av málsviðgerðini av umsóknum um byggiloyvi til neyst.
>
> Umboðsmaðurin gevur sær far um, at ein umsøkjari til neystabygging hevur fingið viðgjørt sína umsókn við noktandi svarið tann 10. september 2020, tykkara mál D.
>
> Í mun til hetta ynskir umboðsmaðurin at fáa upplýst, hvussu nógvar umsóknir um neystabygging – umframt omanfyri nevnda í máli D – eru avgreiddar og hava fingið svar síðani februar 2020.

> Um so er, at nakar umsøkjari hevur fingið játtandi svar frá Runavíkar kommunu uppá umsókn um neystabygging síðani februar 2020, ynskir umboðsmaðurin avrit av øllum skjølum í hesum málum..."

Runavíkar kommuna sendi, tann 4. juli 2022, soljóðandi svar:

> "Tit hava fingið øll málini um neyst og onki annað av teimum er avgreitt.
>
> Men eitt neystamál er komið afturat síðst í juni, tað verður viðheft her."

Tað viðhefta neystamálið var, sambært skjølunum, innkomið tann 22. juni 2022. Móttøkuváttan var send sama dag, eins og málið, tann 28. juni 2022, var sent til hoyring hjá Tjóðsavninum, við tað at neystið stendur í einum øki, har broytingar bert kunnu gerast í samráð við Tjóðsavnið.

Tann 22. august 2022 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, at klagarin í mai 2022 ikki hevði fingið svar frá Runavíkar kommunu í sambandi við umsókn um at byggja neyst, sum var latin inn tann 6. mars 2021. Í framhaldi av teimum svarum, sum komu frá Runavíkar kommunu, valdi umboðsmaðurin at víðka málið og eisini kanna viðurskiftini nærri viðvíkjandi øðrum umsóknum um byggiloyvir til neyst í Runavíkar kommunu.

Álitið snýr seg tí bæði um málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu av málinum hjá klagaranum og málsviðgerðina av hinum umsóknunum um byggiloyvi til neyst, sum vóru sett í bíðistøðu.

<u>Viðvíkjandi vantandi svari og vantandi kunning</u>

Runavíkar kommuna hevur upplýst fyri mær, at Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi, tann 16. mars 2020, at endurskoða reglurnar fyri neystabygging, og at tí verða umsóknir um neystabygging settar í bíðistøðu (parkeraðar), inntil uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini er liðugt viðgjørt og samtykt av býráðnum.

Klagarin sendi, tann 6. mars 2021, Runavíkar kommunu umsókn um byggiloyvi til neyst. Runavíkar kommuna sendi honum móttøkuváttan við telduposti, tann 11. mars 2021, har sagt var frá, at málið var skrásett og sent víðari til avgreiðslu á Teknisku deild. Eftir hetta hoyrdi klagarin einki frá Runavíkar kommunu um sítt mál, fyrrenn Runavíkar kommuna, tann 27. mai 2022, svaraði umboðsmanninum í sambandi við klaguna. Tað sæst í skjølunum, at klagarin, tann 20. apríl 2022, sendi eina áminning til Runavíkar kommunu, men at feilur var í teldupostbústaðnum. Tað kann tí ikki lastast Runavíkar kommunu, at áminningin, tann 20. apríl 2022, ikki varð svarað.

Runavíkar kommuna hevur upplýst fyri mær, at tað, íroknað umsóknina hjá klagaranum, liggja 13 umsóknir um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu. Sambært skjalayvirlitinum hava 9 av hesum umsøkjarum fingið einsljóðandi móttøkuváttan sum klagarin og harvið onga kunning um bíðistøðuna og orsøkina til hana. 2 umsøkjarar hava ikki fingið móttøkuváttan til teirra umsókn, men ein av hesum hevur latið tvær umsóknir inn og fingið móttøkuváttan í sambandi við ta fyrru.

2 umsøkjarar hava fingið noktandi svar til sínar umsóknir vísandi til endurskoðan av byggisamtyktini.

Sambært skjølunum sendu 4 av umsøkjarunum áminningar til Runavíkar kommunu og ynsktu kunning um málið hjá sær. Hesar áminningar sæst Runavíkar kommuna ikki at hava svarað.

Eg haldi tað als ikki vera nøktandi, at Runavíkar kommuna ikki beinanvegin í móttøkuváttanini kunnaði umsøkjararnar um, at mál teirra var sett í bíðistøðu, orsøkina til bíðistøðuna, og nær svar kundi væntast.

Tað er ikki góður fyrisitingarsiður at lata brøv og fyrispurningar liggja ósvarað í longri tíðarskeið. Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan rímiliga tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari, enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Eg fari tí at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri ikki at hava svarað og kunnað klagaran og hinar umsøkjararnar viðvíkjandi málið teirra.

<u>Málsviðgerðin av umsóknum um byggiloyvi til neyst</u>

Runavíkar kommuna hevur upplýst, at orsøkin til, at málini um byggiloyvi til neyst eru sett í bíðistøðu, er, at Byggi- og býarskipanarnevndin og Vinnu- og havnarnevndin samtyktu á fundi í mars 2020 at endurskoða reglurnar fyri neystabygging. Arbeiðið er ikki komið á mál, og tí verða umsóknir um neystabygging settar í bíðistøðu inntil uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini er liðugt viðgjørt og samtykt av býráðnum. Málini hava ligið uttan viðgerð í longri tíðarskeið – í onkrum føri síðani 2020.

Í hesum sambandi vil eg vísa á, at kommunan hevur skyldu at viðgera umsóknir um byggiloyvi eftir galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð. Tað er ikki í samsvar við galdandi lóggávu, at Runavíkar kommuna setti øll mál um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu uttan viðgerð vegna ætlanir at broyta byggisamtyktina.

Um so er, at kommunan hevur ætlanir um at broyta byggisamtyktina, eigur kommunan at fara fram eftir røttum mannagongdum.

Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum (býarskipanarlógin) hevur hesa áseting í § 8:

> "Fyribils forboð
> Tá ið eitt kommunustýri, ið hevur byggisamtykt í umbúnað, biður um tað, kann landsstýrismaðurin nokta fyri, at ein ogn, ið ætlandi kemur inn undir byggisamtykt, verður nýtt á slíkan hátt, ið hildin verður ósamsvarandi byggisamtyktini. Slíkt forboð má bara galda eitt ár og kann ikki, uttan býarskipanarnevndin samtykkir, verða sett meira enn hesa einu ferð."

Hevur ein kommuna ætlanir í umbúna, tó uttan at hesar eru komnar somikið ávegis, at broytingar eru lagdar alment fram, hevur hon, sambært § 8 í býarskipanarlógini, møguleika at biðja landsstýrið um at nokta fyri nýtslu, ið verður hildin at vera ósamsvarandi.

Runavíkar kommuna hevur upplýst fyri mær, at kommunan ikki hevur nýtt mannagongdina í § 8 í býarskipanarlógini í sambandi við, at málini vórðu sett í bíðistøðu.

Eg gevi mær í hesum sambandi eisini far um, at tann eini umsøkjarin heilt ítøkiliga í áminning, tann 23. februar 2021, hevur gjørt galdandi yvirfyri Runavíkar kommunu, at grundgevingin, at arbeitt verður við broytingum, er ósaklig, tí at galdandi byggisamtykt skal brúkast til at viðgera umsóknina.

Eisini vil eg viðmerkja, at eg í sambandi við gjøgnumgongd av skjølunum frá Runavíkar kommunu havi lagt til merkis, at klagumálið til umboðsmannin er skjalført undir byggimálinum hjá klagaranum. Tað hevði eftir míni meting verið greiðari, um klagan varð skjalførd í einum máli fyri seg.

Samanumtikið haldi eg tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna hevur lagt umsóknina frá klagaranum og hinar umsóknirnar um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu og ikki viðgjørt tær sambært galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð.

Eg fari tí at geva Runavíkar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av umsóknunum um byggiloyvi til neyst og mæla Runavíkar kommunu til at endurskoða mannagongdir sínar í sambandi við byggimálsviðgerð.

Av tí at eg haldi talan vera um, at álvarslig mistøk eru framd í hesum máli, fari eg, sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini, at kunna formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismannin í Kommunumálum (Umhvørvis- og Vinnumálum) um hetta málið.

Burtursæð frá hesum geri eg ikki meira við málið í løtuni. Eg fari at biðja Runavíkar kommunu lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður